Modurland vil eg teg kalla,
fødilandid mitt!
Eg vil vera ævi alla
trygdarbarnid titt.
Módurlandid! tær i favni
ungi alvi tín
rópte teg vid hjartans navni:
einkar mamma min.

Módurlandid, módurlandid,
Føroyar, ert tú mær.
Módir min! eg barnabandid
bindi fast at tær.
Ættarhúgurin han dregur
meg at elska teg;
einans tú sum módir hevur
føtt og fostrad meg.

Lat, ja lat so adrar siga,
at teir eiga tvær;
einkarmódir! eg vil bidja,
einans ver tú mær!
Eina modur vil eg eiga
her á fridu fold;
hon skal lak á barn sitt breida
tá tad legst i mold.

*Av Jóannes Patursson.*

Lesebok for ungdomsskulen 1924.